NSÍ-HB 1-0 (0-0):

NSÍ á talvuna

Eftir sigurin á FS Vágum komu HB so ruddiliga niður aftur á jørðina, tá teir máttu lúta fyri stigaleysa NSÍ

2. DEILD
Jákup Mørk

HB fekk eitt stórt skump rætta vegin, tá teir í farnu viku vunnu á stórfavorittunum úr FS Vágum, og leygardagin skuldu teir so fylgja upp upp á hetta, tá teir vitjaðu í Runavík.

Og vónirnar vóru ikki heilt ongar, tí eftir trý umfør høvdu runavíkingarnir framvegis einki stig.

Komu á talvuna

Tað vóru tó runavíkingar, sum fingu einasta málið í dystinum, og var tað Ken Nónklett, sum hetta vikuskiftið var komin niður at hjálpa aðrudeildarliðnum, sum var upphavsmaður til hetta.

Úrslitið ber við sær, at NSÍ nú sum seinasta liðið er komið á talvuna. HB hevði við einum sigri møguleika at leggja seg út í oddastríðið, men nú mugu teir heldur líta niðureftir á talvuni, har teir bert hava eitt stig fleiri enn NSÍ og VB.

Dysturin í tølum:
NSÍ-HB 1-0(0-0)
1-0: Ken Nónklett

Komandi sunnudag stendur triathlon á skránni

Komandi sunnudag skipar Føroya Triathlon Felag - FTF - fyri ársins fyrstu triathlon kapping. Kappast verður í teininum, ið kallast Sprint Triathlon.

TRIATHLON
Tíðindaskriv

Kappingin sunnudagin er tó triðja kapping, ið FTF skipar fyri í ár, og er hetta samstundis triðja kappingin í Grand Prix 2002 kappingini.

Kappast hevur verið tvær ferðir í Duathlon (svimjing og renning), men hesa ferð skulu luttakararnir so súkkla eisini. Luttakarin skal fyrst svimja, síðan súkkla og at enda renna.

Kappast verður sum sagt í Sprint Triathlon sunnudagin. Luttakarin skal tá svimja 750 metrar, súkkla 20 kilometrar og at enda renna 5 kilometrar.

Svomið verður í Svimjihøllini í Gundadali. Súkklað verður frá svimjihylinum, oman eftir Eystara Ringvegi, eftir vegnum Yviri við Strond til rundkoyringina við Skansan, har vent verður. Leiðin gongur so niðan til rundkoyringina við R.C. Effersøe Gøtu/Eystari Ringvegur. Hesin teinur skal koyrast tríggjar ferðir.

Renningin byrjar frá Plantusøluni og runnið verður yvir til Føroya Sparikassa Yviri við Strond og niðan aftur til Plantusøluna har málið er.

Hetta er triðja umfar av Grand Prix 2002 kappingini. Hjá monnum liggur Hallur Stakksund á odda og hjá kvinnum Rannvá Jacobsen.

Hallur gjørdist nr. 2 í fyrstu kapping og vann næstu. Hann hevur tí samanlagt 72 stig.

Rannvá vann fyrstu og gjørdist nr. 2 í næstu kappingini. Rannvá hevur somuleiðis 72 stig.

Kappingin byrjar kl. 13.00 sunnudagin, og luttakarar, sum hava teknað seg til kappingina, skulu møta kl. 12.00.

Henrik nærri Føroyum

Eftir sigurin um vikuskiftið tykist tað bert vera ein avgreiðsluspurningur, nær Ølstykke kann tryggja uppflytingina, soleiðis at Henrik Larsen verður leysur av sínum sáttmála

Komandi landsliðsvenjarin er leysur av Ølstykke, tá uppflytingin er tryggjað, og møguliga er hetta bert eina viku burturi

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Í Fótbóltssambandinum ganga teir í hesum døgum og krossa fingrar fyri, at tað skal gangast Ølstykke í triðbestu donsku deildini væl.

Orsøkin til hetta er hin einfalda, at so skjótt núverandi felagið hjá Henrik Larsen hevur tryggjað sær uppflyting, sleppur nýggi føroyski landsliðsvenjarin at virka sum ein slíkur. Og í FSF verður eins og fleiri aðra staðni vónað, at nýggi venjarin fær umstøður at hyggja at fleiri umførum í føroysku kappingini undan summarsteðginum, soleiðis at hann betri er førur fyri at gera sær eina mynd av leikaratilfarinum, sum hann hevur.

Gongst væl

Og tí er bara at fegnast um, at tað tykist ganga púrasta eftir vild hjá »Stóra«, sum hann eisini verður róptur.

Sunnudagin vunnu teir sostatt 2-0 á Nørre Sundby, og tá bæði Holstebro og Birkerød spældu javnt í sínum dystum, øktist frástøðan niður til liðini, sum eisini dystast um uppflyting.

Ølstykke er í løtuni á øðrum plássi í deildini, nú fýra umfør eru eftir at spæla. Munurin niður til Holstebro á fjórða plássinum er átta stig, so um Ølstykke vinnur, samstundis sum Holstebro tapir, so er uppflytingin veruleiki, og so verður tað neyvan bara í Ølstykke, at propparnir verða skotnir av sjampanjufløskunum.

Sumba-ÍF 1-1 (1-1):

Bæði høvdu møguleikar

Fuglfirðingar brendu brotsspark, men vóru eisini tvær ferðir noyddir at bjarga á mállinjuni, tá teir leygardagin vitjaðu hjá oddafiskinum í aðru deild

2. DEILD
Jákup Mørk

Meðan Sumba leygardagin skuldi royna at halda gongd í stigasavnanini, sum higartil hevði givið fult hvørja ferð, skuldu fuglfirðingarnir hinvegin fáa gongd á, eftir at teir mest sum vóru dragnaðir úr oddastríðnum, longu áðrenn tað veruliga er byrjað.

Fleiri møguleikar

Tað eydnaðist partvíst hjá báðum þortunum, tí hóast tey helst vildu hava trý stig hvør, so mundi javnleikurin vera á eini leiðk, og sum so kann hvørgin parturin vera heilt ónøgdur um úrslitið.

Skal nakar iðra seg, so eru tað kanska fuglfirðingarnir, tí beint áðrenn Sumba fekk leiðslumálið, átti ÍF gyltan møguleika. Brotsspark varð dømt, men hvørki hetta ella eftirfylgjandi returin fingu teir sett inn, og so kontraði Sumba. Teir brutu ígjognum høgrumegin, har teir alla tíðnia vóru vandamiklir, og so kundi Johnny Skibens stúta inn við nærmastu stong.

Fuglfirðingar royndu framhaldandi at trýsta, og teir hóttu fleiri ferðir málið, men hóast teir millum annað høvdu skot á tvørstongina, so tóktist tað teimum tó sera trupult at fáa úrtøku burtur úr møguleikunum. Beint fyri hálvleik bragðaði tó, tá Viggo Johannesen var hægstur við hornaspark og stútaði móti horninum.

Sumbingar høvdu tó fleiri líknandi møguleikar í løtunum eftir útjavnanina, og í tveimum forum hetta til steðgin bjargaðu gestirnir á sjálvari mállinjuni, tá hornaspørk vórðu send innfyri.

Dovnaði

Hetta legði kanska upp til, at spælið framhaldandi skuldi gerast málsøkið í seinna hálvleiki, men soleiðis gjørdist tó ongantíð. Nú ráddi í størri mun um at verja borg. Kanska var orkan eisini við at ganga undan, og yvirhøvur var tað so sum so við skipaða spæli fram eftir vøllinum.

Sum heild mundi talan tó vera um eitt úrslit, sum báðir partar kunnu vera so hampuliga væl nøgdir um. Úrslitini í hinum dystunum merktu, at sumbingar framvegis halda munin niður til næstu liðini, og eftir nøkur sera lak úrslit fingu teir úr ÍF í øllum forum sýnt, at viljin á liðnum er til staðar. Hetta verður helst eisini neyðugt, tá teir komandi vikuskifti fáa vitjan av sandoyingum. Tá fara sumbingarnir til Klaksvíkar, sum hava havt heldur skiftandi úrslit seinastu tíðina, og tí eru møguleikarnir fyri stigum so hampuligir til tann dystin.

Dytsurin í tølum
Sumba-ÍF 1-1(1-1)
1-0: Johnny Skibenæs
1-1: Viggo Johannesen

Óli fekk luft

Við javnleikinum móti FC Aarhus økti Hvidovre um frástøðuna til niðurflytingarstrikuna, men er vandin ikki heilt av

Tað er framvegis møguleiki fyri, at ell tey trý liðini, sum hava føroyingar í hópinum, fara at flyta niður

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen

Føroyskir fótbóltsspælarar eru í trimum donskum feløgum. Óli Johannesen er í Hvidovre, Johan B. Hansen er í Fredericia, og Atli Gregersen er í Randers Freja. Feløgini vóru øll í eldinum í vikuskiftinum, og nú tað resta fýra umfør er tað framvegis møguleiki fyri, at øll feløgini kunnu flyta niður í 2. deild.

Sunnudagin gjørdist tað nærum greitt, at Farum komandi kappingarár skal spæla í bestu deildini. Farum var á útivølli í Valby í Keypmannahavn ímóti Frem, sum alt kappingarárið hevur verið millum avbjóðararnar. Farum vann 4–1. Harvið eru teir undan fýra teimum síðstu umførunum tólv stig og 23 mál undan HFK Sønderjylland, sum er á triðja plássi. Fagnaðurin millum teir umleið hálvt triðja túsund áskoðararnar, sum vóru í Valby sunnudagin – teir flestu vóru úr Farum, og Peter Brixtofte var mitt í rokanum – var stórur, og hann verður ikki minni komandi sunnudag, tá uppflytingin ivaleyst verður veruleiki á heimavølli.

Óli Johannesen og Hvidovre høvdu heimavøll ímóti FC Aarhus. Dysturin endaði málleysur. Harvið økti Hvidovrer frástøðuna til botnin, soleiðis at teir nú eru seks stig frá niðurflytingarplássunum. Tað átti at verið nóg mikið at komið undan niðurflyting, nú tað eru fýra umfør eftir, men støðan er ikki trygg.

Uppaftur veri stendur til hjá Fredericia og Johan B. Hansen. Teir taptu hesa ferð 2–1 í Horsens, og harvið er Fredericia rættuliga trongt í botninum.

Randers Freja er ikki so illa statt á støðutalvuni, sjálvt um teir sunnudagin taptu 3–2 í Odense ímóti B1909.

Men tað er stórur møguleiki fyri, at Randers Freja flytir niður úr 1. deild, og at teir flyta heilt niður í Danmarksseriuna. Orsøkin er hóttanin um, at Randers Freja skal fara á húsagang. Teir eiga ikki pengar til lønir, og um viðurskiftini ikki verða fingin upp á pláss í hesi vikuni, so tykist tað greitt, at lykilin skal snarast um.

Fótbóltsfelagið Randers Freja er til sølu fyri 25 túsund krónur.

HFK Sønderjylland hevur ivaleyst mist allar møguleikar at flyta uppaftur í superliguna. Teir eru á triðja plássinum, og teir standa seg væl. Í vikuskiftinum vóru teir í Keypmannahavn, har teir vunnu 4–1 á B93, sum liggur heilt tungt í sjónum.

Saman við Farum er Køge á veg upp í bestu deildina. Hesa ferð vóru teir á útivølli í Odense, har teir vunnu 1–0 á B1913.

Herfølge vísir eisini støðu avrik. Hesa ferð vunnu teir 3–2 á Brønshøj.

Danska 1. deild

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Farum	26	18- 6 - 2	60	30	30	60
2	Køge	26	18- 3 - 5	50	28	22	57
3	HFK Sønderj.	26	15- 3 - 8	51	44	7	48
4	Frem	26	13- 8 - 5	49	32	17	47
5	Herfølge	26	13- 7 - 6	44	31	13	46
6	B 1913	26	11- 9 - 6	39	33	6	42
7	Randers F.	26	12- 5 - 9	50	31	19	41
8	AC Horsens	26	10- 8 - 8	34	27	7	38
9	FC Aarhus	26	9 - 7 -10	34	38	-4	34
10	Hvidovre	26	7 - 8 -11	39	44	-5	29
11	B 1909	26	7 - 5 -14	41	61	-20	26
12	Kolding FC	26	6 - 6 -14	41	55	-14	24
13	Fredericia	26	5 - 8 -13	35	38	-3	23
14	Brønshøj	26	6 - 5 -15	37	58	-21	23
15	B93	26	6 - 5 -15	33	54	-21	23
16	Skive	26	3 - 5 -18	31	64	-33	14

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre),
Johan Byrial Hansen (Fredericia)

Norska tippeligan

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Lyn	8	7 - 0 - 1	15	8	7	21
2	Molde	9	5 - 2 - 2	15	8	7	17
3	Odd. Grenl.	9	5 - 1 - 3	14	10	4	16
4	Viking	9	4 - 3 - 2	16	11	5	15
5	Rosenborg (M)	9	4 - 2 - 3	16	10	6	14
6	Bodø/Glimt	9	4 - 2 - 3	13	8	5	14
7	Våleranga	9	3 - 4 - 2	12	8	4	13
8	Lillestrøm	9	3 - 4 - 2	8	6	2	13
9	Stabæk	8	3 - 3 - 2	12	11	1	12
10	Brann	9	3 - 1 - 5	12	17	-5	10
11	Bryne	9	2 - 2 - 5	8	15	-7	8
12	Moss	9	1 - 4 - 4	9	18	-9	7
13	Sogndal	9	1 - 2 - 6	10	22	-12	5
14	Start	9	0 - 4 - 5	6	17	-11	4

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

Molde miðjar eftir toppinum

Vánirnar hjá Jákupi Mikkelsen eru einki serligar, tí Eddie Gustafsson er væl fyri, og eingi mál fara ígjognum hjá Molde

NOREG
Jóannes Hansen

Molde er á veg ímóti gullinum. Soleiðis var ein av yvirskriftunum í norsku fjølmiðlunum í gjár. Molde er ikki ovast á støðutalvuni, men teir eru næstovast, og gongdin tær seinastu vikurnar hevur verið støðug og sannførandi.

Sunnukvøldið var Molde á útivølli í Kristiansand, og har var eingin ivi. Molde vann 4–0 á Start. Heimaliðið var væl við fyrstu løtuna, og teir høvdu eisini onkrar málmøguleikar. Molde kom á odda við teprum brotssparki, tá sjey minuttir vóru eftir av 1. hálvleiki, og teir øktu ellivu minuttir eftir steðgin. So tveitti heimaliðið alt ansni í verjupartinum, men tað slerdi orduliga bakk. Mole skoraði aftur í 66. og 86. minuttunum.

Jákup Mikkelsen var aftur hesa ferð á Molde beinkinum, og um ikki okkurt heilt óvæntað stingur seg upp, so eru vónirnar ikki so stórar fyri, at Jákup komandi vikurnar skal fáa aðra dystarvenjing enn hana, sum hann fær á næstbesta liðnum. Eftir at kappingarneytin hjá Jákupi, Eddie Gustafsson, ikki hevði spælt væl nakrar ferðir, hevur hann nu av álvara funnið stevið og fær so mikið góð skoðsmál, at afturvalið hvørja ferð er sjálvsagt.

Hinir dystirnir

Molde er næstfremst við seytjan stigum. Lyn er fremst. Hvussu stór leiðslan hjá teimum er varð avgjørt í gjárkvøldið. Tá skuldi Lyn á útivølli spæla ímóti Stabæk. Men undan tí dystinum var leiðslan hjá Lyn fýra stig.

Sum fleiri ferðir nevnt fyrr í nýggja norska kappingarárinum, so verður roknað við, at Molde skal stríðast við Rosenborg og Lillestrøm um oddasessin.

Tey spældu bæði sunnudagin, og tað gekk betri hjá Lillestrøm, sum vann 1–0 í Bodø. Rosenborg var í Oslo, har teir ikki megnaðu meiri enn málleysan javnleik ímóti Vålerenge. Tað vil við øðrum orðum siga, at munurin frá Molde og aftur til stórsta favorittin at vinna NM, Rosenborg, longdist eitt sindur, men hann er ikki serliga stórur – trý stig.

Odd Grenlad var í Bergen, og gestirnir úr Skien fóru til hús aftur við øllum. Teir vunnu 3–1. Tað var málleyst millum Bryne og Moss, og botnliðið Sogndal tapti enn eina ferð á heimavølli. Hesa ferð høvdu teir vitjan av Viking úr Stavanger, sum vann 2–0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 0–0.